# Ikki finnlendingur

Finski forsætisráðharrin, Matti Vanhanen, væntar ikki, at nakar finnlendingur kann fáa starvið sum tann fyrsti uttanríkisráðharrin hjá ES, og hann hevur heldur ongar vónir um, at Finnland fær tann fyrsta forsetan í samveldinum. Tað sigur Vanhanen í samrøðu við Huvudstadsbladet. Tað hevur ljóðað at finski ES-kommiserurin Olli Rehn kann koma upp á tal sum ES-uttanríkisráðharri, men tann møguleikin minkaði munandi, tá javnaðarbólkurin í ES-tinginum gjørdi av at styðja bretska uttanríkisráðharran, David Miliband, skrivar finska blaðið.



# Sviar spyrja um hjáárin

Svensku fjølmiðlarnir vilja nú hava at vita, um sviar, sum fáa hjáárin av koppingarevninum ímóti H1N1, kunnu krevja endurgjald frá fyritøkuni, sum hevur gjørt evnið. Spurningurin er íkomin, nú tað er komið fram, at danska stjórnin hevur gjørt avtalu við heilivágfyritøkuna Glaxo Smith Kline um, at danir kunnu ikki krevja endurgjald fyri møguligt hjáárin av koppingarevninum. Svensku heilsumyndugleikarnir hava viðgingið, at ein partur av avtaluni við Glaxo Smith Kline er loyniligur, men nú krevja svensku fjølmiðlarnir, at tann loyniligi parturin verður almannakunngjørdur.

# Ruddaðu Seglloftið sunnunáttina

Løgreglan í Suðuroy stongdi sunnunáttina Seglloftið á Tvøroyri, tá klokkan varð blivin hálvgum fýra. Orsøkin til tað var, at eitt glas varð tveitt út gjøgnum eitt vindeyga, og rakti niður á ein bil, sum stóð parkerað-ur frammanfyri bygninginum.

Vakthavandi á Løgreglustøðini á Tvøroyri váttar, at teir høvdu hoyrt graml um, at rúsdrekka varð skonkt til ómyndug, men sigur, at teir einki sóu tá teir vóru har, og at einki tískil kann prógvast.

Talan var um eitt vanligt øl- ella sjussglas, sum fór út gjøgnum rútin, og rakti forrútin á parkeraða bilinum. Einki verður sagt um stórvegis skaða av glasinum tó.

Burtursæð frá at teir føldu seg noyddar at rudda út á Segloftinum á miðjari nátt, sigur vakthavandi at vikuskiftið í Suðuroy hevur verið fyrimyndarliga gott og friðarligt. Onkrir bilførarar eru steðgaðir til kanningar, men alt hevur verið í lagi, sigur vakthavandi á Løgreglustøðini á Tvøroyri.

**- RN**



*Seglloftið, ið hoyrir til býarlívið á havnarlagnum á Tvøroyri, varð um vikuskiftið ruddað út. Henda myndin er tikin á Pubbini, ið hoyrir til sama felag*

*Savnsmynd*

## Tríggir fyrilestrar um ávirkanina hjá Darwin

**Áhugaverdir fyrilestrar um Darwin, og hansara ávirkan á bókmentir, jarðfrøði og um ættartalvur verða á Náttúrugripasavninum mikukvøldið 11. november 2009**

VÍSINDI

*Tíðindaskriv*

Tríggir ymiskir fyrilestrar eru á skránni:

Turið Sigurðardóttir heldur fyrilestur ha r evnið er ávirkanin á bókmentir,

Rolf Guttesen heldur fyrilestur við heitinum »Heiman og handan Darwin. Filosofiskir tankar um evolutiónsteoriina« og

Gunnvør D. Hoydal hevur fyrilestur um fylogeni (ættartalvur) og biosemiotik (samskifti sínámillum og við umhvørvið hjá livandi verum).

Høvi verður eisini at síggja smærri framsýningar við lutum úr føroysku náttúruni, ið lýsa læru Darwins.

Tiltakið verður í framsýningarhølunum hjá Náttúrugripasavninum á Debesartrøð mikukvøldið 11. november 2009, kl. 19.30.

### 2009 serstakt Darwin ár

Tiltakið 11. november er fjórða og síðsta tiltakið í røðini, ið verða skipað í sambandi við, at 2009 er lýst sum eitt serstakt Darwin ár – tað eru 200 ársíðani Charles Darwin varð borin í heim, og 150 ár síðani bókin On the Origin of Species kom út. Og hetta vilja vit eisini hátíðarhalda í Føroyum.

Fróðskaparfelagið, Lívfrøðingafelagið og Náttúrugripasavnið hava í felag lagt eina skrá tilrættis fyri 2009, har vit á ymiskan hátt lýsa persónin Charles Darwin, læruna um lívmenning og hvønn týdning hansara arbeiðið eftirfylgjandi hevur havt á m.a. lívfrøði, heimspeki og bókmentir.

- Læran hjá Darwin – at tær livandi verurnar eru vorðnar til við náttúrligari útveljing gjøgnum milliónir av árum – hevur kollvelt okkara fatan av heiminum, og hevur lært okkum at síggja okkum sjálvi sum ein part av náttúruni, siga Fróðskaparfelagið, Lívfrøðingafelagið og Náttúrugripasavnið í tíðindaskrivi.

# Vikuskiftið merkt av herverki




*Tað kemur javnan fyri at bardagi tekur seg upp í Klubbagarðinum og hetta vikuskiftið var heldur einki undantak. Onkur er vorðin meldaður fyri harðskap*

*Tilvildarlig mynd*

Í politifrágreiðingini fyri vikuskiftið, er tað serliga herverk, ið fyllir væl upp. Í øllum førum sjey tilburðir í Havn eru fráboðaðir.

Í miðbýnum í Havn fekk onkur bilur eisini toyggið leygarnáttina, og er talan har um sera umfatandi skaðar.

Eisini eru nøkur innbrot fráboðað, millum annað vóru nakrir málningar stolnir í einum handli á Áarvegnum, meðan onkur eisini hevði stolið eitt sindur av peningi úr kioskini umborð á Smyrli. Hesir gerningsmenn eru fangaðir.

Tvær ferðir eru politiviðtøkurnar eisini brotnar, og verða teir mennirnir ákærdir fyri hetta. Eitt slíkt brot úrslitar í eini bót.

Onkur klipp í koyrikortið vóru eisini givin um vikuskiftið. Leygardagin seinnapart vórðu tvey klipp givin í Kaldbaksbotni fyri ferð, fyri ávikavist 106 og 108 kilometrar um tíman.

Eisini hevur onkur verið somikið djarvur at yvirhála inni í einum tunli, og tað kostar somuleiðis eitt klipp í koyrikortið.

Fyrrapartin í gjár fekk MRCC eisini eina fráboðan, tá ein bátur hevði mist motorkraftina. Talan var um ein 24 fót plastbát, sum varð staddur suður úr Gomlu Rætt, tá brekið kom á.

**- RN**